# Ger gjøldur burtur úr føroysku klæðunum

**Tað er fallið nógvum føroyingum fyri bróstið, at danska Ekstra Blaðið á heimasíðu sínari hevur gjørt gjøldur burtur úr limunum í kongafamiljuni, sum eru ílatin føroyskum klæðum.**

HOFF STOFF
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni www.eb.dk hevur danska blaðið havt eina atkvøðugreiðslu um, hvørt tað er Heindrikur Prinsur ella Mary Krúnprinsessa, ið sær mest tápulig út í føroyskum klæðum í sambandi við vitjanina í Føroyum í farnu viku.

### Nathue og folkedanserkorsage

Spurningurin á heimasíðuni hjá Ekstra Blaðnum ljóðar soleiðis: Hvem ser mest fjollet ud i færøsk folkedragt? Síðani verður hildið fram: *Prins Henrik i nathue eller kronprinsessa Mary i noget, der mest af alt ligner en folkedanserkorsage*.

Sosialurin hevur frætt frá fleiri føroyingum, ið halda hesa atkvøðugreiðslu verða undir alt lágmark, og sum halda, at hetta er at gera gjøldur burtur úr føroysku klæðunum.

Í sambandi við atkvøðugreiðsluna á heimasíðuni hevur blaðið eisini myndir av bæði Heindriki Prinsi og Mary Krúnprinsessu á veg inn til galladøgurðan í Norðurlandahúsinum mánakvøldið í farnu viku, tá ið øll tann kongaliga familjan var í føroyskum búna.




*Soleiðis sær atkvøðugreiðslan út á heimasíðuni hjá Ekstra Blaðnum, har lesarar blaðsins skuldu gera av, um tað var Heindrikur Prinsur ella Mary Krúnprinsessa, ið sóu býttast út í føroyskum klæðum.*

*Myndaviðgerð: Álvur Haraldsen*



*Blaðstjórin á Ekstra Blaðnum, Hans Engel, sigur, at atkvøðugreiðslan á heimasíðuni hjá blaðnum ikki er gjørd fyri at gera gjøldur burtur úr føroysku klæðunum.*

*Savnsmynd*

### Blaðstjórin avsannar

Hans Engell er blaðstjóri á Ekstra Blaðnum, og hann avsannar, at blaðið ger gjøldur burtur úr føroysku klæðunum.

- Hetta er gjørt til stuttleika. Vit hava avgjørt ikki nakrar ætlanir um at spotta føroysku fólkasálina. Vit hildu, at serliga Heindrikur Prinsur sá løgin út í klæðunum, og tí gjørdu vit hasa atkvøðugreiðsluna á netinum, sigur Hans Engell.

Danski blaðstjórin sigur, at tað mangan áður er komið fyri, at blaðið hevur nýtt ymiskar myndir av limum í kongshúsinum í ymiskum serligum búnum til okkurt stuttligt, og hann nevnir í hesum sambandi millum annað, at blaðið einaferð gjørdi nógv burtur úr Heindriki Prinsi í donskum admiralbúna.

- Vit hava gjørt hetta til stuttleika, men um føroyingar hava tikið tað illa upp, so er tað harmiligt. Hetta er undir ongum umstøðum eitt tekin um manglandi virðing fyri føroyingum og føroyskum klæðum, sigur Hans Engell.

Til stuttleika kann nevnast, at Heindrikur Prinsur greitt vann atkvøðugreiðsluna á heimasíðuni hjá Ekstra Blaðnum.

---

# Viðingar átala sjónvarpið

**Viðareiðis Kommuna hevur sent Jógvani á Lakjuni, mentamálaráðharra, eitt skriv, har kommunan átalar, at SVF als ikki hevði dekning av vitjanini hjá krúnprinsaparinum á Viðareiði seinasta mikudag**

HOFF STOFF
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í skrivinum, sum er undirskrivað av Árna Absalonsen, borgarstjóra, verður funnist hvassliga at SVF, tí sjónvarpið bara dekkaði summi øki í sambandi við kongaligu vitjanina. Viðareiðis Kommuna krevur í skrivinum, at manglandi dekningurin av vitjanini á Viðareiði fær avleiðingar.

### Høvdu gjørt nógv burturúr

Sagt verður, at bæði bygdin og fólkið á Viðareiði hava gjørt sera nógv burtur úr vitjanini hjá teimum kongaligu, og tey eru sera vónsvikin av, at føroysku loftmiðlarnir virða hetta so lítið. Somuleiðis verður sagt, at tað hevði havt stóran týdning fyri bygdina, um hon hevði fingið eitt sindur av umtalu og harvið "reklamu" í sjónvarpinum.

Tá ið drotningin vitjaði í Føroyum í 1995, var eisini vitjað á Viðareiði, men heldur ikki tá hevði SVF nakra dekning av Viðareiði, og tí høvdu viðingar væntað og vónað, at SVF royndi at gera skaðan góðan aftur hesaferð, men teir fóru skeivir. Viðingar halda, at tá talan er um public service, eiga teir at fáa eins góða umtalu sum onnur, og tá ið tað ikki er gjørt, ivast teir í, um viðingar ikki eiga at sleppa undan at gjalda til SVF/ÚF.

Vit royndu mánadagin at fáa eina viðmerking bæði frá landsstýrismanninum, Jógvani á Lakjuni, og stjóranum fyri Kringvarpi Føroya, Jógvan Jespersen, men hvørgin teirra var at hitta.

*Viðingar eru vónbrotnir av, at SVF ikki hevði nakran dekning av, tá ið krúnprinsaparið í farnu viku vitjaði á Viðareiði. Tí hevur borgarstjórin í Viðareiði kommunu, Árni Absalonsen, sum her vísir krúnprinsahjúnunum runt, sent landsstýrismanninum í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, eitt klaguskriv*

*Mynd: Bárður Lydersen*

